# Ísbjørnin í vanda

Amerikanska stjórnin hevur gjørt av at seta ísbjørnina á listan við djórum, sum eru í vanda fyri at doyggja út. Dirk Kempthorne, innanríkisráðharri, segði í gjár, at tann minkandi ísurin kring Norðpólin tekur lívsgrundarlagið undan ísbjørnini, og at tað tí er neyðugt at staðfesta, at hon er í vanda. Kanadisku myndugleikarnir hava ikki tikið sama stig sum USA, hóast umleið tveir triðingar av heimsins ísbjarnum halda til í kanadiskum øki.

*Sambært amerikanarunum eru ísbjarninar í vanda fyri at doyggja út*

*Mynd: Vísir*



# Vend í Danmark

Ta seinastu tíðina hava fleiri danskir búskaparfrøðingar ávarað um, at gongdin í danska búskapinum fer at venda, og summir teirra vænta, at pílurin fer ikki at venda tann rætta vegin aftur fyrr enn um eini tvey ár. Helge Pedersen, sum er búskaparfrøðingur hjá Nordea Bank, sigur við JydskeVestkysten í dag , at arbeiðsloysið fer neyvan at veksa stórvegis í Danmark, og hann eggjar eisini fólki til at halda fram við verandi privatu nýtsluni.

# Vanda-mikli mussurin

**Nýggj spennandi ungdómsbók um kærleika, vinalag, einsemi og morð í heitari summarsól**

BÓKMENTIR
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Vandamikli mussurin
Eftir Kjetil Johnsen
Jákup í Skemmuni týddi
Ætlað 12-16 ára gomlum
Forlagið Nýlendi gav út
Ronja Berg myndprýddi
192 síður
79 kr.

Vandamikli mussurin er onnur bókin í spildurnýggju krimirøðini við felagsheitinum 3 VINKONUR eftir norskametsølurithøvundanum Kjetil Johnsen. Fyrsta bókin, Eitt hol í sálini, kom út til jóla í 2007, og triðja bókin kemur eftir ólavsøku. Ætlanir eru um 12 bøkur.

Kjetil Johnsen er føddur í 1966. Hann hevur starvast sum blaðmaður og sum blaðstjóri á størstu norsku ungdómsbløðunum. Bókarøðin „Tusen biter“ (18 bøkur) byrjaði upprunaliga sum ein framhaldsrøð í «Vi og Gutta» og varð sera væl móttikin. Kjetil er nú ritstjóri í stóru blaðfyritøkuni Egmont.

- Eg skrivi ikki pedagogiskar bøkur. Bøkurnar skulu vera so spennandi, at tær fáa nógv ung at lesa. Eisini tey, sum vanliga ikki lesa so nógv, sigur Kjetil Johnsen.

- Tíverri eru dreingir ikki so grammir at lesa sum gentur, sigur Kjetil. Teir kunnu fáa áhuga fyri fyribrigdum sum Harry Potter, men tað merkir ikki, at teir halda fram, og at teir lesa nógv, soleiðis sum gentur ofta gera, sigur Kjetil Johnsen. Hann heldur tað ikki vera so umráðandi at læra nakað í einari spennandi bók, ið tú lesur sum undirhald.



*- Eg skrivi ikki pedagogiskar bøkur. Bøkurnar skulu vera so spennandi, at tær fáa nógv ung at lesa. Eisini tey, sum vanliga ikki lesa so nógv, sigur Kjetil Johnsen*

- Eg orki hvørki at skriva ella lesa ov nógvar málandi lýsingar, fløkjasligt mál og sálarfrøðiligar hugleiðingar. Nei, gev mær heldur eitt dráp ella bæði tvey!

Triðja bókin í 3VINKONUR-røðini við heitinum Tað, sum fer at henda, kemur á føroyskum eftir ólavsøku.

### Soleiðis byrjar Vandamikli mussurin:

Ein ung genta verður funnin deyð á einum lítlum vatni í Djúpadali:

“Hon er nakin. Hann kannar hana. Hann heldur hana vera vakra. Hann veit, at hon er 15 ára gomul. Nærri sagt 15 og eitt hálvt. Hon er júst byrjað í tíggjunda. Hon er fullkomin, lýtaleys, sum so mangar á tí aldrinum. Húðin er sløtt og rein. Men hon er eisini køld og gráblá av lívloysi.“

# TVAZZ á altjóða sjónleikafestival

**Leikbólkurin TVAZZ er nú boðin til altjóða sjónleikafestival í Tampere í Finnlandi**

TÍÐINDASKRIV

Leikbólkurin TVAZZ, sum kom á føroyska sjónleikapallin við leikunum Køksdrotningarnar (2006) og Fundamentalisturin (2007) er nú boðin á altjóða sjónleikafestival í Tampere í Finnlandi. Hetta er 40. festivalurin, sum verður hildin í býnum Tampere/Tammerfors í døgunum 4. – 10. August í ár.

Í ár verða norðurlendskir teaturdagar eisini hildnir á sama festivali, og í tí sambandi verður stórt norðurlendskt showcase á festivalinum. TVAZZ er við í høvuðsskránni á festivalinum við leikinum Fundamentalisturin, sum varð sýndur fyri fullsettum húsum á Meiarínum í fjørheyst.

### Finskur leikur á føroyskum

Leikurin Fundamentalisturin er finskur og hevur verið spældur í mongum leikhúsum í Finnlandi síðan 2006, tá hann hevði frumframførslu. Eisini har fyri fullsettum húsum. Men festivalurin hevur valt at bjóða TVAZZ at framføra sína uppseting av leikinum, har spælt verður á føroyskum við enskum undirteksti. Hetta er rættiliga vanligt á festivalum, har luttøka er úr ymsum londum. Ein leikbólkur úr hvørjum Norðurlandi er við í høvuðsskránni, umframt bólkar úr Letlandi, Estlandi, Grikkalandi, Fraklandi, Týsklandi og aðar staðni. Allir bólkar eru yrkisleikbólkar og eru nógv frammi í løtuni. Sí meira um festivalin á heimasíðuna www.teatterikesa.fi.

### Fundamentalisturin í uppskoti til norðurlendska leikritavirðisløn

Á norðurlendsku teaterdøgunum, sum verða hildnir annaðhvørt ár, verður norðurlendska dramatikara virðislønin handað. Hetta er virðisløn fyri besta norðurlendska leikrit, sum skrivað er seinastu tvey árini, og sum hevur havt frumframførslu. Hvørt land innstillar ein leik og er tað stýrið í Nordisk Teater Union, sum viðgerð uppskotini og velur ein vinnara. Tað vísir seg, at Finland hevur innstillað Juha Jokala netupp fyri leikin Fundamentalistin. Tí kann væntast, at uppsetingin hjá TVAZZ verður væl vitjað á festivalini. Umframt heiðurin fær vinnarin virðisløn áljóðandi 5000 EUR, ella umleið 37.000 kr.

### Komandi verkætlanir hjá TVAZZ

TVAZZ hevur aðrar verkætlanir í umbúna. Eitt nú at uppseta leikin Fundamentalisturin uttanfyri Føroyar. Næsta verkætlan í Føroyum verður væntandi í vetur 08/09 og møguliga ein verkætlan til Listaleypin. At seta leikir upp krevur nógva fígging og leitar TVAZZ í løtuni eftir stuðlum og sponsorum til verkætlanina.

Men fyribils er fyrsta verkætlan hjá TVAZZ í 2008 at taka upp aftur Fundamentalistin og at luttaka á festivalinum í Tampere í august. Tað verða Bárður Persson og Gunnvá Zachariasen, sum spæla leiklutirnar sum ávikavist presturin Markus og Heidi. www.tvazz.com